Sosialurin
...títt vinnublað




VINNAN
VINNU- OG HANDILSTÍÐINDI Í SOSIALINUM

# Løvubetong víðkar um virksemið


*Regin Johannesen er stjóri á Løvubeton*

**Meðan aðrar byggifyritøkur helst hugsa um at repa seglini, hevur Løvubetong við Norðskála víðka um sítt virksemi. Teir eru nú farnir undir at framleiða betongelementir og tað merkir, at teir nú hava enn fleiri bein at standa á. Og hóast teir merkja eina niðurgongd í virkseminum roknar stjórin, Regin Johannesen, við, at ferð nokk skal koma á aftur**

BYGGIVIRKSEMI
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*
*Myndir: Álvur Haraldsen*

Løvubetong við Norðskála hevur eftirhondini fleiri ár á baki, men kortini ikki undir verandi navni. Regin Johannesen er stjóri á Løvubetong.

- Upprunaliga var tað Herman Mørkøre, sum byrjaði betongvirkið á Eiði fyri nógvum árum síðani, men í 1984 varð tað keypt og fekk navnið Løvubetong. Og tað hevur so hildið til á Norðskála í eini 25 ár, sigur Regin Johannesen.

Tað byrjaði sum nevnt á Eiði, men eftir nøkrum árum varð tað flutt suður Streymoyarmegin, norðanvert brúnna, har, sum ruskplássið hjá Sunda kommunu nú er, áðrenn tað endaði Norðskálamegin.

Á Løvubetong hava tey fýra høvuðsøkir.

- Vit hava tað, sum virkið byrjaði við, nevniliga at blanda betong, tað gera vit enn, og tað verður so koyrt út til kundar, bæði stórar og smáar. Vit hava eisini sementheilsølu, har vit innflyta sement í stórum nøgdum og selja og koyra út í tangabili til kundar í Føroyum. Vit hava eisini størsta flytbara kranan í Føroyum, sum vit leiga út til tey, sum hava brúk fyri honum, og síðst, men ikki minst, eru vit byrjaðir at framleiða betongelementir eisini, sigur Regin Johannesen.

Uppgávurnar hjá virkinum eru ógvuliga ymiskar, og betongblanding og útkoyring fevnir um alt frá gørðum til stórar virkisbygningar og havnaløg.

Løvubetong er sum nevnt farið undir at framleiða betongelementir.

- Tað tykist vera ein góður marknaður fyri tí, og hesin byggihátturin verður nógv nýttur í londunum rundan um okkum. Tað hevur eisini verið nýtt í Føroyum, men vit rokna við, at tað er nakað, sum fer at vinda upp á seg, sigur Regin Johannesen.

## Alt innflutt

Løvubetong eru ikki einsamallir á føroyska marknaðinum, tá tað kemur til betongelementir.

- Tað er eisini eitt virki við Gjógv, og tað hevur eisini fleiri ár á baki. Eisini